











# Eskil Ljungberg

## 1886 - 1985

## Í Føroyum 1953 - 1985

Michael Paul Reveal
eftir áheitan frá Fimmtiáranevndini

Serlig tøkk til
Roy Philbrow og Eðvarð T. Jónsson

Marianna Debes Dahl týddi úr enskum

ISBN 999918-921-4-1
© Bókmentanevnd Bahá'ía í Føroyum 2004

# Eskil Englebert Joachim Ljungberg



Eskil tíðliga í 1970-árunum

var føddur hin 20. mai 1886 í Filipstad í Svøríki. Undan fyrra heimsbardaga leitaði Eskil sær til Onglands og fekk skjótt starv hjá aðalsfólki uttan fyri London. Ovfarin og uttan iva foyur, nú hann soleiðis alt í einum kom í hóslag við skikkir og vanar hjá aðalsfólki, var hann djarvur og helt treiskliga fram við at læra seg, hvussu tú eigur at bera teg at, og hvussu tú ært skil á fløkjunum á einum væl dúkaðum borði.

Sambært brøvum hansara og óprentaðu endurminningum, gav hann seg av fullum hjarta í part við Onglandi og varð sjálvur ímyndin av tí enska harranum, fínur í medferð og sýndi altíð fullkomiliga kurteisligan atburð. Sum Eskil sjálvur greiðir frá, so “livdi hann vanligt lív og tókst við sovorðið, ein tekst við í einum stórbýi”. Men so “vanligt” kann tað kortini ikki hava verið, hugsa vit um, hvussu tíðirnar vóru. Tríatiára yrkisleið hansara byrjaði, tá ið tær fyrstu skotríðirnar frá fyrra heimsbardaga dundu, og hann helt á at arbeiða í London, meðan ein av ringastu kreppum herjaði, og meðan tær ógvisligu, kollveltandi hendingarnar í øðrum heimsbardaga østu alt upp. Honum so líkt, ger hann ikki nógv av, tá ið hann nevnir, at hann búði “í London, meðan tíðirnar vóru ovurtorførar”.

Tá ið hann hevði lagt kríggið aftur um seg, og framtíðin lá ótrygg framman fyri honum, leitaði Eskil sær ráð hjá vinum um, hvat ið hann nú skuldi fara at gera. Sum hann lítur aftur um bak, sigur hann, at tað, sum hendi næst, var “tað mest áhugaverda, sum nakrantíð er hent mær…” Honum varð veitt loyvi at fara at granska á bretska savninum. Hann segði, at tað, at hann slapp at lesa á bretska savninum var “stórt”, og at hesin møguleiki helt á at vera honum týdningarmikil, sum árini gingu. Hann fór at lesa átrúnaðarliga heimspeki og søgu, sum høvdu hansara stóra áhuga, tí sum hann tekur til í einari av viðmerkingum sínum, hann hevði “ongantíð mist

trúgv (sína) á Gud" hesi árini "og tað (var hann) ógvuliga takksamur fyri". Hann varnaðist, at álit og trúgv hansara á Gud, sum hann hevði fingið heimanfrá í Svøríki, ikki hevði slept "takinum" á honum.

Hóast Eskil greiðir frá, at hann kann hava hoyrt orðið "Bahá'í" onkuntíð tað drúgva tíðarskeiðið, hann dvaldist í Onglandi, so var tað ikki, fyrr enn hann fór aftur til Svøríkis, har ið hann var føddur, at hann varnaðist Bahá'í-trúnna. Sum hann var úti og spákaði ein dagin tíðliga á sumri, hitti Eskil eina eldri svenska kvinnu, sum hevði verið meginpartin av ævi síni í USA. Jennie Ottila Anderson var komin aftur til Svøríkis við júst tí í hyggju at lata landsmenn sínar fáa lut í boðskapinum frá Bahá'u'lláh, honum ið grundaði Bahá'í-trúnna.

Fyrsti tilvildarligi fundur teirra var stuttur, men alla summarfrítíðina úti á bygd hugsaði hann framvegis um Trúnna. Tá ið hann kom aftur til Stokkhólm, játtaði hann at koma at hitta nýggja ameriska vinin til tess at læra meiri um Bahá'u'lláh og um, hvussu týdningarmikið kall hansara er fyri mannaættina alla. Eskil sat við størsta áhuga og lurtaði í fleiri tímar, og hesa ferð varð alt "klárt". "Beinanvegin" segði Eskil frá, at hann trúði upp á Bahá'u'lláh. Tað var um heystið 1947; Eskil var 61 ára gamalur.

Eskil fór at lesa læruna hjá Bahá'í-trúnni hjá frú Anderson og øðrum. Dagarnir og árini gingu. Á teimum nýstovnaðu andaligu Bahá'í-samkomunum í Stokkhólmi og seinni í Göteborg bar Eskil fram boðskapin. Men hann kom til eitt vegamót í lívi sínum á Altjóða Bahá'í-ráðstevnuni í Stokkhólmi í juli 1953. Mangan segði Eskil frá, hvussu hann, tá ið heitt varð á einstaklingar at fara burtur í fremmand lond at lata onnur fáa lut í boðskapinum hjá Bahá'u'lláh, føldi, at ósjónligar hendur beinleiðis skumpaðu hann fram at bjóða sær til sjálvboðin at bróta slóð fyri Bahá'í-trúnni í Føroyum.

Ikki ein mánað aftan á, at Eskil hevði strongt tað heit at vága sær til Føroya, eydnaðist honum at selja allar ognir sínar, eisini fyrndargamla innbúgvið, sum hann var so góður við. Við ongum øðrum enn nøkrum fáum illa farnum kuffertum helt Eskil aftur leiðina úr Svøríki umborð á einum skipi til eitt fremmant land. Hann kom til Føroya seint í august 1953. Hann var 67 ára gamalur.

Tað man hava verið skakandi hjá einum, ið einki annað visti um enn hámentað umhvørvi og lívligar Bahá'í-fundir, at koma til ein blett í Norðuratlantshavinum, sum hann má hava hildið vera ógvuliga troystarleysan. Eskil kom til Føroya ein hósmorgun í oysandi regni – oysandi regni, sum hann festi seg við, helt á í eina heila viku. Eftirsum øll gistingarhúsini vóru full, fann hann innivist fyri náttina í einum útgerðarbygningi hjá Hotel Hafnia í einum "evarska lítlum rúmi" til støddar sum eitt "skáp", men "gullreint", sigur hann frá. Dagin eftir fekk hann eitt vanligt kamar á Hotel Hafnia, sum var heim hansara teir fyrstu níggju mánaðirnar av teimum 32 árunum, hann dvaldist í Føroyum.

Sum frá leið, kom skil á hjá Eskil. Fólk komu fram og buðu sær til at hjálpa honum at finna okkurt at búgva í. Hann fann eina lítla íbúð, og spakuliga men uttan at víkja av leið fór hann at rætta seg eftir føroyingum. Tolin og biðjandi royndi Eskil at sáa trúarfræið ímillum føroyingar. Nógvir føroyingar høvdu illtanka til hansara, men aðrir hildu hann vera áhugaverdan og sýndu sannan vilja til at tosa við hann, hóast tey kanska ikki sýndu stórvegis vilja til at taka ímóti tí nýggju trúnni, sum hann hevði givið seg undir.

Hesi fyrstu árini í Føroyum vitjaðu nøkur fá, men tað nógva av tíðini fór til at práta við gamlar havnarmenn, til ómetaligt brævaskifti við Bahá'í-ar frá allari verðini og til at týða nakrar Bahá'í-skriftir til svenskt. Samstundis snúði gerandisdagurin seg um bøn. Uppi hvønn morgun klokkan fimm las hann bønir sínar og endurtók hesar inniligu bønir á miðdegi. Hann oysti úr ovurstórari goymslu av gleði, lukku og eldhuga. Í støðum hómast henda djúpa gleðin í nøkrum av brøvum hansara.

Seint í 1950-árunum tóku fíggjarumstøðurnar í Føroyum at batna, og nú bjóðaði vertur Eskil honum eina størri íbúð. Hann hevði búð í einari lítlari, trongari íbúð í fimm ár. Hesum tók Eskil glaður ímóti og varð verandi í nýggju íbúð síni í fimm ár afturat. Sum Eskil tók til: hann var í "himli", og tað tóktust grannabørnini eisini vera, støðugt flyktust tey undir vindeygum hansara á ovaru hædd og biddaðu góðgæti frá honum eins og ein ovfarakátur smáfuglaflokkur. Tá loraði Eskil við samanknýttum bandstubbum smáar bommpakkar til glaðu børnini niðriundir. Tað var honum sonn frøi at geva børnunum burtur av góðgætisgoymslu síni, og hann treivst væl saman við

teimum. Millum pappírini hjá honum lógu væl goymdar tvær tekningar av útróðrarbátum, sum ein grannadrongur hevði teknað í august 1972.

Fleiri ferðir fór Eskil til Íslands, fyrstu ferð summarið 1957. Manga minniliga og framúrskarandi prædiku helt hann fyri tí fyrstu íslendsku Bahá'í-samkomuni. Tá ið hann soleiðis vitjaði, hitti hann allar teir íslendsku Bahá'í-ararnar og skipaði fyri fundum at fáa teir at skilja uppaftur betur hesa merkisverdu trúgv. Hann kom eisini í samband við tann lítla bólkin av týskarum í Íslandi. Nakrir av hesum fyrstu útflytingunum fóru seinni at vera uppi í teimum fyrstu trúgvandi í Íslandi. Á einari av hesum stuttu ferðunum í Íslandi hitti Eskil Kristján Eldjarn, sum seinni varð forseti Íslands.

Hóast hann til tíðir uttan iva hevur verið ógvuliga einsamallur í Føroyum, varðveitti Eskil eina djúpa innvortis gleði og ein eldhuga, sum tað ongantíð myrktist fyri, hóast føroyingar ikki beinanvegin svaraðu upp á Boðskapin, sum hann so inniliga tráaði eftir at lata teir fáa lut í. Endiliga, í 1965, segði fyrsti føroyingurin seg skilja, hvussu týdningarmikil læra Bahá'u'lláh var, og fór at lesa saman við Eskil.

Um hetta mundið var Eskil fluttur inn í Niels Finsensgøtu 46 í ta íbúðina á niðastu hædd, sum hann búði í til sín doyggjandi dag. Her fór at vera mangur góður døgverðin og drekkamuður. Alskna skemtilyndi og andaliga styrki hansara drógu at sær. Nú var hann ikki longur fremmandur, heldur sum ein skyldmaður hjá nógvu føroysku vinunum, sum litu á hann og høvdu djúpa virðing fyri honum. Eini hjún kallaðu enntá ein av synunum upp eftir Eskil.

Nú komu aðrir Bahá'í-ar og steðgaðu styttri ella longri tíðarskeið, og døkkin av einari Bahá'í-samkomu tók at hómast. Andaliga tolsemið greipað við óstýriliga kæti og eldhuga hansara var trilvandi Bahá'í-samkomuni mikil stuðul hesi árini, hon kom undan kavi í Føroyum. Endiliga, í apríl 1973, var fyrsta andaliga Bahá'í-tingið sett í Havn. Honum var hetta riddaraslag á lívskvøldi hansara í Føroyum.

Alt lívið í Føroyum var hann á nærum hvørjum Bahá'í-mánaðarfundi og á at kalla hvørjari samkomu, hvørjum bønarfundi og lesitíma. Ja, hann sást



Bahá'í ráðstevna, Tórshavn, 1974
Eskil standandi í miðjuni í aftaru røð

á flest øllum samkomum, antin tær vóru almenn kunngerðar-tiltøk ella stuttleikaútferðir. Sjálvbjargin var hann alsamt, búði einsamallur og helt sjálvur hús. Tey, sum fingu ta gleði at støkka inn á golvið hjá honum, minnast hjartaligan blíðskap, har ið hvør vitjandi sær kendi seg sum serligan gest.

Meginpartin av lívinum hevði Eskil góða heilsu. Sjálvt tá ið hann móti endanum viknaði, var hann framvegis rankur, næstan sum ein kongaligur. Ein dagin tíðliga í 1985 hoknaði hann niður í íbúðini og var sendur á sjúkrahús. Í tvær vikur afturat livdi hann. Sjálvt, tá ið likamið at enda tók at svíkja, var hann framvegis púra klárur og savnaði seg um at veita øðrum gleði. At enda, hin 23. februar 1985, 98 ára gamal, fór sálin hjá Eskil á flog.

Stutt eftir tað vóru virðismiklu likamligu leivdirnar av Eskil Ljungberg grivnar í grýtuta føroyska lendið í útjaðaranum av Havnini. Tíðliga í 1953 mundi fáur úti í heimi vita um Føroyar. Í dag vita allir Bahá'í-ar, hvat land hesin kendi merkisriddari hjá Bahá'u'lláh hættaði sær at fara til. Úr øllum

heraðshornum koma fólk at vitja gravstað hansara. Tey leita eftir einari hvítari ørn við útbreiddum veingjum, sum er til reiðar at lætta sær á og flúgva høgt oman fyri skýggini. Liggjandi á knæ senda tey honum eyðmjúkliga takkar-og heiðursbønir. Sum tey kveita uttan um seg at grasgrønu líðunum og bláa havinum, royna tey at skilja tol hansara, dirvi, áræði, seiggj og djúpa, óvikandi kærleika hansara mótvegis øllum.

*"Eg svørji við honum, sum er sannleikin! Um skamma stund fer Gud at prýða Bókina um Tilveruna við nøvnunum á teimum, sum Hann elskar, sum hava liðið mótburð á gøtu Hans, og sum í Hansara navni og til tess at prísa Honum hava ferðast ígjøgnum londini. Hvør tann, sum hevur verið nær teimum, fer at fegnast um møtið, og øll, sama í hvørjum londum tey dvøljast, verða upplýst av minninum um tey".*

Bahá'u'lláh




Hvíldarstaður Eskils í Tórshavn

"Við andláti høgt elskaða, støðufasta, mótaða riddaran hjá Bahá'u'lláh Eskil Ljungberg endar eitt fyrimyndarligt æviskeið við trúskapi, sálarstyrki, fullhugaðum gudrøkni mótvegis Signaðum Vakurleika. Hann var verandi í ódn síni og møtti allari mótstøðu við kærleika og tolni, vann hjørtu og legði andaliga grund fyri Guds Sakir í Føroyum. Vit veita honum brennandi bønir og fáa sál hansara at nærkast Kongaríkinum Abhá".

Alheims Rættvísishús Bahá'í Heimsmiðstaðarinnar, Haifa, Ísrael

**ISBN 999918-921-4-1**
© Bókmentanevnd Bahá'ía í Føroyum 2004